

## Húsavørðar

Tórshavnar kommuna søkir eftir tveimum húsavørðum til ávíkavist eitt tímalønt starv við Argja skúla og eitt fastlønt starv við Kollafjarða skúla.

**Arbeiðsøki**

- røkja bygningarnar og økið uttanum
- gera smærri umvælingar
- ábyrgd av at el, vatn, hiti og sanitetsviðurskiftini eru í lagi
- røkja ventilatiónuna
- ábyrgd av at brunaviðurskifti og trygdarútbúnaðurin er í lagi
- umsjón av svimjihylinum

**Aðrar uppgávur**

- samskipa virksemið á skúlanum eftir vanliga skúlatíð
- flagging sambært áseting skúlans

**Vit rokna við at tú**

- hevur handverkaraútbúgving sum húsasmiðjur ella líknandi
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir við bæði børn og vaksin
- hevur koyrikort

Kommunan skipar fyri skeiðum í viðlíkahaldi av bygningum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til leiðaran fyri Húsaumsitingini, Harald Bjørgvin, tlf. 302010 og skúlastjóran við Argja skúla, Marjun Holm, tlf. 302510 / 221466 ella skúlaleiðaran við Kollafjarða skúla, Karina Hammer, tlf. 302553 / 221407.

**Umsókn**
saman við tilmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 16. mars 2007. Merkið umsóknina „Húsaumsitingin".

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

STARVSMANNAFELAGIÐ

## Aðalfundur

Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður **leygardagin 17. mars 2007 kl. 13.00 í Norðurlandahúsinum.**

**Skrá:**

1. Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Lógarbroytingar
4. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
5. Ásetan av limagjøldum.
6. Val av 2 nevndarlimum og 2 tiltakslimum.
7. Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi.
8. Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 10. mars 2007.**

***Starvsmannafelagið***

## Starvsfólk til INTERSPORT Klaksvík

**Søkt verður eftir** 2 fólkum m/k til nýggja ítróttarhandil okkara, sum letur upp í apríl mánaða í Klaksvík.
Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði og tey ið sett verða skulu byrja fyrst í apríl til upplæring í deild okkara í Tórshavn.

**Intersporthandilin í Klaksvík** verður ein partur av deildum okkara í Tórshavn og á Glyvrum og koma starvsfólkini í Klaksvík at hava eitt tætt samarbeiði við hesar deildir. Somuleiðis koma tey at hava dagligu ábyrgdina av handlinum í Klaksvík.

**So ert tú** ein fryntligur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta starv.

**Umsóknir** við prógvum og viðmælum verða at senda til:
Thomas Dam Ítróttur
Niels Finsensgøta 5
Boks 268
FO-110 Tórshavn

INTERSPORT

www.sosialurin.fo

## Shark Atlantic í miðlahúsinum

**Leygardagin 3. mars kl. 15:00** verður skipað fyri tiltaki í miðlahúsinum í sambandi við at fiskikappingin Shark Atlantic er liðug



*Mynd: www.mari-tour.com*

**Skrá**

- Magni Blástein bjóðar vælkomin
- Øl og smyrjibreyð og eitt gott prát
- Ali Celebi, stjóri á TRYGD handar virðislønir
  *3. vinningur á kr. 5.000,-*
  *2. vinningur á kr. 10.000,-*
  *1. vinningur á kr. 25.000,-*
- Magni Blástein handar ferðasteyp, sum Føroya Banki hevur latið
- Prát um stórar fiskar

**Tiltakið endar uml. kl. 18:00**

***Øll eru vælkomin***




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni